**Munnligur fyrispurningur**

**til Annika Olsen, landsstýriskvinnu**

**um veruliga kostnaðin av eldraøkinum**

1. Hvør er metti kostnaðurin av, at veita øllum pensjónistum fyribyrgjandi heimavitjan, so sum ásett í lógaruppskoti frá landsstýriskvinnuni ?
2. Hvør er metti kostnaðurin av, at veita reingerð heima hjá eldri, ið hava tørv á hesum ?
3. Hvør er metti kostnaðurin av, at lata heimarøktini játtan til tað tal av tímum, ið mett verður er veruligi tørvurin á eldraøkinum ?
4. Hvør er metti kostnaðurin av, at tey, ið standa á bíðilista, sleppa inn á ellis- og røktarheim ?
5. Hvør er metti kostnaðurin av, at endurmenning verður veitt samsvarandi tørvinum ?
6. Hvør er metti kostnaðurin av, at fyrisitingin av eldraøkinum og partvíst heilsuøkinum verður flutt frá landi til kommunur ?
7. Metir landsstýriskvinnan at tørvur er á størri játtan til eldraøkið, enn tann játtan, ið landsstýrið hevur mælt til á fíggjarlógini fyri 2014 ?
8. Ætlar landsstýriskvinnan at kommunurnar fáa játtan frá landinum til tænasturnar, ið nevndar eru undir spurningi 1-6 ?

**Viðmerking**
Landsstýrið hevur lagt fyri Løgtingið lóg, ið skal flyta ábyrgdina av eldraøkinum og parti av heilsuøkinum frá landi til kommunur.

Samstundis verður sagt, at fíggjarlig játtan skal fylgja frá landi til kommunur, ið vil tryggja góða tænastu. Upphæddin, ið higartil hevur verið nevnd, er grundað á núverandi fíggjarlógartøl og ikki á, hvat eldraøkið í veruleikanum kostar.

Tí seinastu árini hevur eldraøkið verið rakt av munandi sparingum. Bara í fjør varð neyðugt við fleiri eykajáttanum bara fyri at varðveita mest grundleggjandi tænasturnar.

Tykist tí ikki sum samsvar er millum veruliga tørvin á játtan, og tað, ið landsstýrið ætlar at lata kommununum. Tí er nógv sum bendir á, at landsstýrið ikki ynskir at uppraðfesta økið, men heldur áleggur kommununum uppgávuna, uttan at neyðuga fíggjarliga játtanin fylgir við.

Fyri at fáa lýst málið, verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni. Spurningarnir eru ætlaðir fyri at fáa svar uppá, hvør kostnaðurin er, um nevndu tænastur verða veittar samsvarandi veruliga tørvinum, og harvið hvør veruligi kostnaðurin av eldraøkinum er. Íløgur í fyribyrgjandi átøk, endurmenning v.m. vilja yvir tíð eisini merkja minni tørv á øðrum tænastum, men hesi krevja, at íløgur fyrst verða gjørdar, áðrenn avkastið sæst seinni. Tí verður biðið um mettan kostnað uttan avleiddu avleiðingarnar yvir tíð, tí hetta eru útreiðslurnar, ið landið nú biður kommunurnar átaka sær.

Á Løgtingi, 28. januar 2014

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi